# Føroyski ketilin sparir nógva olju



Ketlavirkið Hógv í Søldarfirði hevur úr at gera í hesum tíðum. Átta fólk arbeiða hjá virkinum. Tey kundu lættliga verið fleiri, sigur Jákup Olsen, stjóri, men hann sigur, at tey halda vikrið vera passaliga stórt, sum er.

Partafelagið Hógv varð stovnað í 1990, og tað eru fleiri, sum eiga felagið. Tey fyrstu árini innflutti felagið svenskar ketlar, og seinni fór felagið at gera svensku ketlarnar upp á licens. Men tá svenska verksmiðjan bleiv stongd, gjørdu tey á Hógv av at fara undir egna framleiðslu. Tað hevur riggað stak væl, og higartil hevur virkið gjørt umleið 1.300 ketlar, og sølan veksur støðugt.

Jákup Olsen sigur, at fólk eru væl nøgd við ketlarnar frá Hógv. Eitt er, at teir hava víst seg at rigga væl, men tað hevur uppaftur størri týdning, at teir føroysku ketlarnir eru sera orkusparandi. Virkið hevur fleiri dømi um, at oljunýtslan er farin niður í helvt, eftir at fólk hava fingið sær ketil frá Hógv, sigur hann.

- Vit halda, at vit hava tann besta ketilin á føroyska marknaðinum, sigur Jákup Olsen.

Hógv ger fyri tað mesta ketlart til sethús, men virkið hevur eisini gjørt ketlar til størri bygningar so sum barnagarðar, skúlar og fiskavirkir. Í løtuni eru tey í ferð við at seta nýggjar ketlar upp á Kósavirkinum í Klaksvík.

Hógv er ikki bara ketlavirki. Fyritøkan ger eisini alt vanligt hita-, sanitets- og ventilasjónsarbeiði kring alt landið.

























